**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð**
**Bygdarráðsfundur tann 28. apríl 2021, kl. 19.00**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Laila Haldansen, Anja Haldansen Eyðun Hansen, Elsi Christiansen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Ingi Olsen boðað frá, at honum barst frá at møta á fundinum, tí hann er burturstaddur.
1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð tann 22. februar, men hann fekk ikki møtt.
Síðani fekk 2. tiltakslimurin Elsi Christiansen fundarboð, og hon játtaði at møta.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.
Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Elsi Christiansen sum tiltakslimur.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 22**
Mál frá Fíggjarnevndini um Økið á Fitjum kring standmyndinina av Ólavi á Heygum
J.nr. 2000002-14-2020

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 20. apríl 2021 málið um økið á Fitjum kring standmyndina av Ólavi á Heygum.
Jákup Durhuus og Maud Poulsen vóru á fundi við Høgna Kastalag og Svend Sivertsen frá FuglArk tann 14. marts 2021.
Arbeiðið hjá FuglArk verður væntandi liðugt innan ein mánað.
Ein leystlig meting sigur, at kostnaðurin at gera økið kring standmyndina liðugt fer at kosta umleið kr. 150.000. Tá verður roknað við, at arbeiðstoymið hjá Vestmanna Kommunu ger arbeiðið.

**Viðv. 22**
Pauli T. Peteren, borgarstjóri, skeyt upp at samtykkja at heita á umsitingina um at gera uppskot til Mentanarnevndina um, hvussu kr. 150.000 kunnu umraðfestast á fíggjarætlanini fyri Vestmanna Kommunu fyri 2021 til endamálið.
Uppskotið var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.15

Sign.:

Pauli T. Petersen Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen

Laila Haldansen Anja Haldansen Elsie Christiansen